## Gamlar skúlabøkur

Tá Løgtingið í gjár viðgjørdi eitt uppskot frá Tjóðveldisflokkinum um at játta meiri pengar til frálærutilfar til skúlarnar, kom fram, at sambært Skúlabókagrunninum er tørvur á nýggjum frálærutilfari á at kalla øllum økjum í fólka- og miðnámsskúlanum. Hetta hildu fleiri tingmenn vera ov vánaligt, og teir mæltu til at taka munagóð stig sum skjótast. Undir orðaskiftinum bleiv nevnt, at í føroyskum verða 30 ára gamlar bøkur brúktar.

## Ungdómskvøld

Týskvøldið 13. mars skipar Klaksvíkar bókasavn fyri einum ungdómskvøldi, har ungfólk fara ar framføra drama, og ungir guitarleikarar úr Klaksvíkar Tónlistaskúla fara at framføra tónleik. Harafturat fer 18 ára gamla Sigga Maria Hjalmarsdóttir Højgaard at lesa úr sínum yrkingasavni „Orð hava tagnarskyldu", sum kom út í síðsta mánað. Ungdómskvøldið á Klaksvíkar bókasavni er fyri ung úr 7. flokki og eldri og byrjar klokkan 19.30.

# Jóannes fekk størsta hemaran

**Leygardagin í farnu viku varð avdúkað, hvør hevði fingið størsta hemaran í kappingini Shark Atlantic 2007.**

VEIÐA

*Snorri Brend*
*Myndir: Magni Blástein*

Tað var havnarmaðurin Jóannes Gaard sum í vetur hevði fangað størsta hemaran.

Ein dagin, hann var til fiskiskap eydnaðist honum at hála ein 177 kilo stóran hemara innanborða. Hetta var samstundis størsti hemarin í kappingini.

Fyri hetta fekk hann í fyrstu syftu høvuðsvinningin, ið var ein kekkur uppá 25.000 kr. frá Trygd.

Ikki nokk við tað, tí Jóannes fekk eisini triðstørsta hemarin í vetur. Hesin vá 95 kilo.

Næststørsta hemaran fekk Heini Weihe. Hesin vá bert sjey kilo minni enn tann størsti, nevniliga 170 kilo.

Íalt luttóku 30 mans í kappingini. Sjálvur heldur fyriskiparin, Magni Blástein at talið kundi verið munandi hægri.

- Kappingin hevur hinvegin fingið góða umrøðu í ár. Tí vænti eg at tað verða minst 50 mans við í kappingini komandi vetur, sigur hann.



*Teir hugna sær við einum góðum práti um veður og hemarar*




*Jóannes Gaard við teimum mongum vinningunum, m.a. einum spæli frá Bátatænastuni*



*Teir tosa saman og evnið hesaferð er nýggja spælið*




*Kappingin er lokin og kappingin er avgjørd. Høgrumegin: Magni Blástein, fyriskipari, Jóanes Gaard ið vann 1. og 3. vinningin uppá ávikavist 25.000 og 5.000 kr, Ali Celebi frá Trygd og Heini Weihe sum fekk 2. plássið, ið gav honum ein kekk uppá 10.000 kr.*